

# Posta Stamps Føroyar

Nr. 2
November 2009

ISSN 1603-0036

**Tríggjar nýggjar frímerkjaútgávur**
**Týskur savnari vitjar Føroyar**
**Ársins endasøla 2009**

Posta
FAROE ISLANDS




# Undirføgru Føroyar

Ein ævintýrkendur heimur undir vatnskorpuni. Fangaður í søkjaranum hjá Inga Sørensen, kavara og undirsjóvarfotografi.

Í Føroyum eru nógv einastandandi vøkur undirsjóvarlandsløg. Ævintýrkend støð, ið ongin enn hevur verið og vitjað. Tað fara at ganga nógv ár, áðrenn kavarar hava rannsakað bara helmingin av okkara frálíku ókendu undirsjóvarverð.

Sjálvur royni eg við fotomyndum at vísa fólki á tær ókendu Føroyar, sum liggja og bíða eftir, at vit kavarar skulu koma at rannsaka tær.

Har liggja eisini nógv goymd og gloymd skipsvrøk frá farnum øldum, sum fjala mong spennandi og hugkveikjandi loyndarmál.

Tað, sum er einastandandi við Føroyum sum kavingarstað, er tað margfalda undirsjóvar-landslagið, mergjaðir taraskógir við lokkandi sandeygum. Steyrrættir veggir, ið hvørva í bládýpið, og ein ørgrynna av ymiskum gjáum og hellum, sum eru sera forvitnisligar at kava í. Nógvastaðni er sjógvurin krystallklárur og sólargeislarnir kasta skuggar á botnin. Reyðsprøkur, skrubbur, kalvaspraggur og hav-taskur liggja pinnastillar í sandinum, ímeðan tær eygleiða kavaran, sum stillisliga glíður ígjøgnum sjógvin sum ein sveimandi fuglur á himmalhválvinum.

Føroyar eru eitt satt kavaraparadís, sum ikki stendur aftan fyri nakað annað land. Tað er ikki lætt at seta orð á upplivingarnar, tá ið farið verður við báti undir bjørg í góðveðri at kava. Orð røkka næstan ikki til, tá ið greiðast skal frá kenslunum, sólini, berginum, fuglinum, sjónum, fiskinum, taraskóginum, litspælinum og teimum frálíku grótskapilsunum á botni, har alt gongur upp í eina hægri eind.

Tær fýra myndirnar, sum prýða frímerkini, eru tiknar í Kvívík. At kava í Kvívík er sum ein túrur í eina prýðiliga viðarlund. Har er vakur, litríkur taraskógur, sandur og sandeygu. Fyri at koma út til sandin má ein fyrst svimja eina løtu omaná ella ígjøgnum rættiliga nógvan taraskóg, og tað er her, myndirnar á frímerkjunum eru tiknar á umleið fimm metra dýpi. Har eru nógvar ymiskar verur at síggja, so sum stórir krossfiskar, sum liva av øðum, ið eisini eru at finna her, hóast tær eru





væl fjaldar. Ofta hevur ein haft reyðsprøkur, skrubbur og havtaskur við heim aftur til ein góðan døgurðabita. Ein orsøk til, at eg ofta kavi í Kvívík, er hon, at tað er skjótt og lætt at koma til Havnar og úr Havn. Einum nýtist ikki bát. Ein biltúrur uppá fimtan minuttir er tað, sum skal til. Og so er tað gott at koma útí og uppaftur, og ein fær skolað útgerðina við vatni á støðni.

Mín áhugi fyri kaving byrjaði, tá eg var lívbjargari í Svimjihøllini í Gundadali. Tók **Padi Open Water** skeiðið fyri sjey árum síðan. Gloymi ongantíð ta heilt ótrúligu kensluna, tá eg fyri fyrstu ferð leyp á sjógv í gomlu Hoyvíkini. Tað var ein uppliving, sum setti síni djúpu spor í mína sál. Síðan tá havi eg kavað so at siga dagliga. Tað er vorðið til nógv prógv og eina ørgrynnu av einastandandi upplivingum. Í dag starvist eg sum vinnukavari *(commercial diver)* og havi kaving *(recretional diving)* sum ítriv, har myndatøka er vorðin ein litinskapur. At kava er at liva. Tað er ein heimur fyri seg, ið tey flestu kunnu royna, um tey vilja leggja nakað fyri. Vit hava í løtuni tveir skúlar til frítíðarkaving í Føroyum. So tað er at melda seg til - og hurðarnar verða opnaðar til okkara undurfulla undirsjóvarheim!

Eg havi í mong ár kavað nógv saman við útlendingum í Føroyum og havi upplivað teirra eldhuga fyri okkara náttúru. Fleiri av teimum hava sagt mær, at hetta var teirra besta kav - og tað, hóast teir hava kavað kring um allan heimin. So her er nakað hjá ferðavinnuni at vinna burturúr.

Tað er mín vón, at mínar myndir fara at menna Føroyar sum kavaraparadísið í Norðurhøvum.

Ingi Sørensen

# Firvaldar *Lepidoptera*













Í Føroyum eru higartil skrásett 154 ymisk firvaldasløg. Ein stórur partur av teimum eru ikki búføst her á landi, men koma henda vegin við m.a. lýggjum vindi sunnanífrá, stundum heilt úr Suðureuropa og Afrika. Tað verða støðugt skrásett nýggj sløg av firvaldum. Eitt nú vóru 54 sløg skrásett í 1956, og í 1999 vóru 106 sløg skrásett. Um vit samanbera við londini sunnanfyri okkum, so eru 154 sløg ikki nógv. Eitt nú eru staðfest uml. 2500 ymisk sløg í Danmark.

Av teimum sløgum, sum verða umrødd her, er onki av teimum búfast í Føroyum. Tistilfirvaldurin *Vanessa cardui* og páfirvaldurin *Inachis io* hoyra til álvaættina *Nymphalidae* og flúgva um dagin.

Kongsfirvaldurin *Agrius convolvuli* og náhøvur *Acherontia atropos* hoyra til kvøld-sveimaraættina *Sphingidae* og flúgva frá skýmingini og út á náttina.

### Tistilfirvaldur *Vanessa cardui* (Linnaeus, 1758)

Hesin ferðafirvaldurin, sum hevur eitt veingjaspenni á 5-6 cm, er búfastur í Norðurafrika. Hann sæst ikki árliga í Føroyum men ger summi ár innrás og sæst tá í stórum tali, sum t.d. í 2009, ið verður mett at vera metár í øllum Europa. Tá teir eru komnir higar, amast teir at byrja við uppi á fjallatoppunum. Hetta fyribrigdið kallast "hill topping". Tá allir møtast har uppi, liggur væl fyri hjá teimum at finna sær ein maka, nú teir hava nomið nýtt land. Síðani verpa teir í akurtistli (*Cirsium arvense*) og tvíbýlisnotu (*Urtica dioica*), sum ormveran livir av. Roynist summarið væl, klekir eitt nýtt ættarlið til heystar, og teir eitast at leggja leiðina suðureftir fyri at leita sær vetursetu í heitari londum.

Fyrstu ferð vit hoyra um tistilfirvaldin í Føroyum, er frá rannsóknum framdar í tíðarskeiðinum 1863-68. Óførur at ferðast, sum hann er, so vann ein slíkur vegin fram heilt norður til Svalbards í 1978.

### Páfirvaldur *Inachis io* (Linnaeus, 1758)

Páfirvaldurin er sjáldsamur gestur í Føroyum og er fyrstu ferð skrásettur í 1938 her á landi.

Slagið er búfast í londunum sunnan fyri okkum; eitt nú í Bretlandi, Danmark og Noregi. Hann hevur eitt veingjaspenni á 5-6 cm, og á øllum fýra veingjum sæst ein "eygnablettur", ið líkist "eyganum" í páfuglavelinum. Ormveran, sum livir á tvíbýlisnotu (*Urtica dioica*), er bert funnin einaferð í Føroyum, og tað var í Haldórsvík í 1992.

Har páfirvaldurin búleikast fast, hevur hann tað fyri at finna sær vetursetu inni í húsum, so sum vørubygningum. Tískil verður páfirvaldurin av og á innsløddur til landið við farmi.





### Kongsfirvaldur *Agrius convolvuli* (Linnaeus, 1758)

Kongsfirvaldurin, ið er skrásettur fyrstu ferð í Føroyum í 1947, kemur úr Norðurafrika. Ì 2003 vóru 11 kongsfirvaldar sæddir. Teir eru sjáldsamir, so hetta var metár. Teir kunnu hava eitt veingjaspenni á 12 cm og kunnu flúgva 55 km/t.

Kongsfirvaldur livir av nektari. Eins og ein kolibri hongur hann stillur í luftini við títtum veingjasløgum, meðan hann við sínum langa sevili sýgur nektar úr blómum.

Ormveran livir á ymiskum sløgum í *Convolvulaceae* ættini. Av vøkstri, sum er at finna í Føroyum, sigst hon kunna liva av hømuligusløgum *Rumex*.

### Náhøvur *Acherontia atropos* (Linnaeus, 1758)

Hesin sera sjáldsami gestur úr Norðurafrika er størsta firvaldaslag, sum er funnið í Føroyum. Veingjaspennið kann fara upp um 13 cm. Náhøvur er ein av teimum heilt fáu firvaldunum, sum kunnu láta við at blása luft út gjøgnum sevilin.

Fyrstu ferð, ein veit um náhøvur her á landi, var hin 20. oktober í 1933. Leif Dahl (Firvaldar, 1956) greiðir soleiðis frá:

*"Maður var á útróðri eystan fyri Fugloy. Sum hann best sat, varð hann varur við at tríggir "smáfuglar" komu flúgvandi úti frá havinum. Ein av teim datt í sjógvin, meðan hinir hildu leiðina inn móti landi. Tá maðurin fekk hendur á hesum "smáfugli", var tað eitt náhøvur."*

Kvennfirvaldurin leggur millum 150 og 200 egg, men stovnurin hevur verið í stórari minking. Tað kemst m.a. av, at ormveran fyri ein stóran part livir í eplaveltum, og har eplir verða velt við vinningi fyri eyga, hevur nógv verið sproytað við eitri ímóti skaðadjórum. Eisini sigast nýmótans landbúnaðarmaskinur, nýttar til eplaídnaðin, at hava sína ávirkan.

Hans Eli Sivertsen




# Grind

Grindahvalur (*Globicephala melas)* svimur fram við Føroyum á veg suður og norð millum tey ymsu støðini í sínum búøki. Einir 800 til 1500 hvalir hava verið dripnir árliga tey 300 árini, vit hava hagtøl um. Leysliga roknað kunna 1000 hvalir geva eini 500 tons av mati, og tað sigur alt um, hvussu ómetaliga stóran týdning grindahvalur hevur havt fyri liviumstøðurnar hjá fólkinum í Føroyum.

Einki súgdjór uttan einstakir smáir gnagarar liva og hava livað uppi á landi í Føroyum, undantakið hara, ið er innflutt í 19. øld. Einasta súgdjór, føroyingar hava veitt, er kópur. Grindahvalurin verður ikki veiddur í orðsins rætta týdningi, men rikin á land, tá hann kemur fram við oyggjunum. Tí er ikki rætt at tosa um veiði av grindahvali.

Í Føroyum hevur eingin havt framíhjárætt til matin úr havinum, heldur ikki grindahvalin. Topografisku umstøðurnar eru hinvegin so, at bert ber til at halda til og drepa grind í ávísum bygdum og støðum. Hesi støð eru ásett við lóg síðan 1832, men onkur lík skipan hevur helst verið galdandi frammanundan eisini. Fólkið á hesum støðum hevur kortini ikki havt framíhjá rætt til grindahvalin. Hann eiga øll, og øll hava fingið og fáa enn javnstóran part: nýføðingar eins væl og oldingar, eisini gestir á vitjan. Soleiðis hevur verið skapt ein heilt einastandandi sosial skipan í sambandi við gagnnýtslu av grindahvali í Føroyum.

Tað hevur eisini altíð verið hvønsmans rættur at taka lut í grindadrápi, men m.a. tí at føroyingum ongantíð hevur dámt at hava konufólk á báti í vinnuligum sambandi, hevur heldur ikki verið siðvenja at kvinnur eru á grindabátunum. Hesin kynsmunur er tó ikki galdandi við grindaskifti.

Mangir útlendingar hava verið hugtiknir av grindadrápinum. Ikki minst danski amtmaðurin í Føroyum Christian Pløyen, sum tí yrkti *Grindavísuna*. Hetta er yrking til danskt vísulag sum í lutvís háfloygdum orðum ber fram virðing fyri føroyingum og hesum serstaka tátti í landsins mentan. Vísan hevur vanliga verið kvøðin í tí sonevnda grindadansinum, ið varð troðin eftir eitt grindadráp, helst bæði av frøði yvir tann góða fong, fyri at stytta sær

Grindahvalur *Globicephala melas*



stundir til sýslumaðurin var liðugur at skifta grindina og fyri at halda fløvanum. Grindadansur verður valla troðin longur.

Soleiðis kemur hesin mentanartáttur upp í skaldskap og list. Fleiri yrkjarar sipa til grindarakstur í yrkingum um gerandislív føroyinga og í fosturlandsyrkingum sínum t.d. Hans Andreas Djurhuus, Mikkjal á Ryggi og Jóannes Patursson.

Í myndlist hevur grindadráp fingið sítt serliga pláss við tí kenda og høgt metta listamálaranum Sámal Joensen-Mikines. Grindadráp er eitt av meginmotivum hansara, ið hann vendir aftur og aftur til. Málningar hansara við hesum motivi eru helst teir, sum hava gjørt hann mest kendan og virdan millum bæði føroyingar og útlendskar kennarar av list hansara.

Seinastu árini hava nógvar atfinningar verið móti grindadrápi frá umhvørvisverndarfelagsskapum víða um heimin. Funnist hevur verið at drápsháttinum, ið verður mettur sum djórapínsla, og at hvalurin er eitt hótt djóraslag, ið heilt eigur at friðast. Úr Føroyum hevur verið svarað aftur á ymsan hátt. Víst verður øðrumegin á, at lítið meira enn 0,01% av hvalastovninum verður tikin í Føroyum, og at grindadrápið tí væl og virðiliga er á burðardyggum stigi. Hinumegin hevur sera nógv verið gjørt fyri at bøta um drápsháttin, og strangari reglur er settar í verk fyri at minka um og heilt forða djórapínslu.

Føroyingar hava enn í hvussu er hildið fast við henda siðaarv hóast atfinningarnar, og flestu føroyingum dáma enn sera væl tvøst og spik av grindahvali. Tekin eru tó um, at tey yngstu ættarliðini ikki njóta henda forkunnuga rætt eins nógv og teirra foreldur, so kann henda at tvídrátturin millum aldargamlan siðaarv og nútímans náttúruhyggju um skamma stund finnur eina loysn heilt natúrliga og av sær sjálvum.

Eyðun Andreasen

# Útgávuætlan 2010

## 22. februar

### Ókendu Føroyar




- fýra brúksmerki. Ingi Sørensen hevur tikið myndirnar. Fýra postkort verða eisini givin út. Virði: 1,00, 6,00, 8,00 og 12,00 kr. FO 677-680.

### Firvaldar




- fýra einkultmerki við tekningum hjá Astrid Andreasen. Virði: 6,00, 8,00, 14,00 og 16,00 kr. FO 681-684.

### Grind




- eitt frímerki. Edward Fuglø hevur teknað. Virði: 50,00 kr. FO 685.

## 26. apríl

### Norðurlandamerki 2010 "Við sjóvarstrond - alivinna"




– smáark við tveimum frímerkjum. Edward Fuglø leggur til rættis. Virði: 2 x 10,00 kr. FO 686-687.

### Europa 2010 "Barnabøkur"




- tvey einkultmerki. Barnabøkurnar: "Ein hundur, ein ketta og ein mús" eftir Bárð Oskarsson og "Ferðin hjá Mosamollis" eftir Janus á Húsagarði. Frímerkjahefti við sjálvklistrandi frímerkjum. Virði: 10,00 og 12,00 kr. FO 688-689.

### List úr føroyskum litum

- tvey einkultmerki við málningum hjá Eli Smith. Litirnar hevur Eli sjálvur framleitt úr føroysku náttúruni. Virði: 18,00 og 24,00 kr. FO 690-691.

## 20. september

### Jens Chr. Svabo




- fýra einkultmerki. Anker Eli Petersen leggur til rættis. Virði: 6,00, 12,00, 14,00 og 22,00 kr. FO 692-695.

### Epli og røtur




- tvey einkultmerki. Edward Fuglø teknar. Virði: 6,00 og 8,00 kr. FO 696-697.

### Jólafrímerki




- tvey einkultmerki, sum ímynda jólasangirnar "Lítla fitta nissa mín" og "Á barnaárum ungu". Anker Eli Petersen. Frímerkjahefti og tvey postkort. Virði: 6,00 og 10,00 kr. FO 698-699.DKK.

### Postgjaldsmerki 2010

Fýra postgjaldsmerki. Myndevnið er ikki avgjørt.

## 10. november

Árbók, ársmappa (289,00 kr.) og jólamerki. Myndevnið á jólamerkjunum er ikki avgjørt.
*Gevi gætur! Útgávuætlanin kann broytast.*






Thomas von Loeper

# Týskur savnari vitjar Føroyar

Í døgunum 15. og 16. september 2009 fingu fleiri Samkeypshandlar og posthús vitjan av einum týskara, sum ynskti at keypa postgjaldsmerkini fyri 2008, sum gingu út 15. september og nýggju postgjaldsmerkini, sum komu út dagin eftir.

Thomas von Loeper savnar postgjaldsmerki og hevur eina lítla fyritøku "ATM International," har hann m.a. fæst við at selja postgjaldsmerki úr øllum heiminum.

Hann hevur lagt seg eftir at bjóða eitt stórt úrval av postgjaldsmerkjum við ymiskum virðum og úr ymiskum londum. Týdningarmikið er eisini fyri onkrar savnarar úr hvørjari posttøku í landinum postgjaldsmerkini eru úr.

Hetta ber í sær at Thomas ferðast nógv fyri at fáa fatur á nýggjum postgjaldsmerkjum sama dag tey koma út. Hann var í Føroyum fyri fyrstu ferð í januar 2009 fyri at keypa fyrstu føroysku postgjaldsmerkini og ger hann einar 20 tílíkar túrar um árið til lond í øllum heiminum.

Thomas sigur, at til ber at býta postgjaldsmerkjasavnarar sundur í tveir høvuðsbólkar: teir ið hann kallar "hard core" savnarar, sum vilja hava hvørja broyting og hvørt frábrigdi við í savnið og so teir, ið bert ynskja at fáa sjálvi postgjaldsmerkini. Harumframt eru eisini tema-savnarar, ið td. savna øll frímerki og postgjaldsmerki úr einum ávísum landi ella eitt ávíst myndevni og at enda eru savnarar, ið einans savna postgjaldsmerki og ikki vanlig frímerki.

Vit takka Thomas von Loeper fyri vitjanina og ynskja honum vælkomnum eina aðra ferð.





# UPPLIVINGAR Í FØROYUM
## - ógloymandi minnir

**Hoyr** dunið av tí víðopna havinum í skjóttgangandi bátum ella njót ein róligan fiskitúr við eitt av teimum mongu vøtnunum kring landið. Gerið til dømis eina ferð í fjøllini á hestbaki ella á motorsúkklu. Sígið í dragandi bjørgum okkara ella upplivið vøkru oyggjarnar í tyrlu.

**Gev** tær sjálvum, familjuni ella vinunum eina ógloymandi ferð í Føroyum.

**Green Gate Incoming** bjóðar eina heila røð av áhugaverdum upplivingum runt um í Føroyum.

Sí meira á
**www.greengate.fo**
ella set teg í samband
við okkum á 350520

**Saman finna vit tað rætta tilboðið til tín**

***Visti tú at...***




**National Geographic Traveler:**

Heimsins reinasta oyggjaland

Føroyar varð í desembur 2007 kosið, sum heimsins reinasta og óspilta oyggjasamfelag av 111 møguligum






# Nýggjar tænastur frá Posta

### Send brævið, tá tú fert til handils !

Nú kanst tú keypa frímerki, bjálvar, postkort o.a. í tínum samkeyps- ella merkohandli, og leggja postin í postkassan, sum hongur uttanfyri.

Handlarnir, sum Posta hevur avtalu við, selja harumframt frímerki, bjálvar, postkort o.a. - tað sama sum posthúsini selja.

### Fá posthúsið heim til tín !

Liggur tað ikki fyri at fara á posthúsið, so ber tað nú til at fáa posthúsið heim til tín.

Við nýggju Posta Heima tænastuni ber til at avgreiða øll postørindi við hús ella á virkinum, tá tað liggur best fyri hjá tær. Tænastan er virkin frá kl. 8:00 á morgni til kl. 21:00 á kvøldi.

Við tænastuni ber m.a. til at senda og fáa pakkar, senda virðisbrøv og innskrivað brøv rinda rokningar, taka pening út av girobankakontu og annars allar tænastur, ið verða veittar á posthúsinum.

Prísirnir fyri Posta Heima eru teir somu, sum á posthúsunum

Ringið á tel. 81 81 81 og avtalið tíð.





# Global Warming mappa

Hetta er fyrstu ferð vit gera eina mappu av hesum slag. Bert ein útgáva er í mappuni – tvey frímerki og smáarkið, ið komu út í februar 2009. Harumframt er ein ensk frágreiðing frá Boga Hansen um veðurlagsbroytingar.

Í tekstinum nevnir Bogi Hansen millum annað hetta:

*Tað ber ikki til at steðga heimsins veðurlagsbroytingum í einum. Vit hava órógvað javnvágina í veðurlagnum, og tað tekur tíð at rætta hana uppaftur. Ein bilur heldur fram eina góða løtu aftan á, at tú trýsti á bremsuna, og soleiðis er eisini við veðurlagnum. Tað er neyðugt at trýsta á bremsuna, áðrenn vandin er heilt eyðsýndur.*

Prísur: 55,00 kr.




# Ókendu Føroyar: postkort og maksi-kort

Í samband við frímerkjaútgávuna "Ókendu Føroyar" geva vit eisini fýra postkort út. Tey eru avmyndaði niðanfyri sum maksi-kort.

Myndirnar til postkortini eru tiknar á havsins botni við Kvívík, Hoyvík og Tjørnuvík.

Myndamaður er Ingi Sørensen, sum eisini hevur tikið myndirnar til frímerkini.









# Ársins endasøla 2009

Hin 31. desember 2009 er seinasti søludagur fyri frímerkini og vørurnar á hesum síðum.

Hetta er tískil seinasti møguleiki at ogna sær frímerkini fyri áljóðandi virði.

Vørurnar kunnu bíleggjast á bíleggingarlepanum mitt í blaðnum ella á heimasíðu okkara: www.stamps.fo.



FO 539-548



FO 554-563



FO 523-524


FO 552-553



FO 564-565



FO 566-567



FO 568-575



FO 576-577



Frímerkjahefti 576-577



Frímerkjahefti 566-567


FDC-mappa 2005


Heftimappa 2005



Ársmappa 2005



Árbók 2005

# Nýggjar frímerkjaútgávur



Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | Ókendu Føroyar - brúksmerki |
| Útgávudagur: | 22.02.2010 |
| Virði: | 1,00, 6,00, 8,00 og 12,00 kr. |
| Nummur: | FO 677-680 |
| Frímerkjastødd: | 30,0 x 40,0 mm |
| Myndir: | Ingi Sørensen |
| Prentháttur: | Offset + metal 877 silver |
| Prentsmiðja: | Southern Colour Print, Ný Sæland |
| Postgjaldsbólkur: | Innanoyggja smábrøv og miðalbrøv umframt miðalbrøv til Evropa, 0-50 g |



Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | Firvaldar |
| Útgávudagur: | 22.02.2010 |
| Virði: | 6,00, 8,00, 14,00 og 16,00 kr. |
| Nummur: | FO 681-684 |
| Frímerkjastødd: | 30,0 x 40,0 mm |
| Teknað: | Astrid Andreasen |
| Prentháttur: | Offset |
| Prentsmiðja: | LM-Group, Canada |
| Postgjaldsbólkur: | Innanoyggja smábrøv og miðalbrøv, og stórbrøv til Evropa, 0-50 g, umframt innanoyggja miðalbrøv, 101-250 g |



Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | Grind |
| Útgávudagur: | 22.02.2010 |
| Virði: | 50,00 kr. |
| Nummur: | FO 685 |
| Frímerkjastødd: | 28,27 x 46,0 mm |
| Teknað: | Edward Fuglø |
| Prentháttur: | Offset + metal FX |
| Prentsmiðja: | Southern Colour Print, Ný Sæland |
| Postgjaldsbólkur: | Innanoyggja stór brøv, 1001-2000 g og stór brøv til Evropa, 251-500 g. |

Snið og uppsetan: Posta Stamps - Prentsmiðja: TrykTeam, Danmark

Posta Stamps
Óðinshædd 2
FO-100 Tórshavn
Føroyar

Tel. +298 346200
Fax +298 346201
stamps@posta.fo
www.stamps.fo